# Restskuldartrygging

## Lívstrygging

Restskuldartryggingin gevur tær møguleika at tryggja, at tín skuld ella partur av henni verður útgoldin, um tú doyrt, soleiðis at fíggjarliga byrðan hjá tínum avvarðandi verður lættari at bera.

Tryggingarupphæddin verður nýtt til at gjalda inn á tína skuld í Føroya Banka og/ella skuld upptikin í DLR umvegis Føroya Banka, um tú doyrt, áðrenn tú nært fólkapensjónsaldri.

Restskuldartryggingin er ein lívstrygging, ið verður teknað sum Samlagstrygging. Tað vil siga, at hesar tryggingar verða teknaðar í einum stórum felags bólki. Hetta gevur betri javnvág, tá hugsað verður um skaðagongd og prísáseting.

## Hvør kann tekna Restskuldartrygging?

Allir persónar, ið ikki eru fyltir 51 ár, sum hava eitt lán í Føroya Banka ella í DLR umvegis Føroya Banka, kunnu tekna eina Restskuldartrygging. Tað er ein treyt fyri at fáa hesa trygging, at tú ert arbeiðsfør/ur, frísk/ur og kanst útflýggja eina nøktandi heilsuváttan.

## Prísur og tryggingarupphæddir

Lánsupphæddin, sum kann tryggjast, er í mesta lagi kr. 1.700.000 fyri hvønn lántakara. Fyri hvønn tryggjaða kann samlaða tryggingarupphæddin fyri Samlagstrygging og Restskuldartrygging tó ongantíð fara upp um kr. 3.000.000. Upphæddin á restskuldartryggingini er føst til fólkapensjónsaldur.

Hevur tú valt, at tryggingargjaldið skal takast av eftirlønargjaldinum, kann samlaði kostnaðurin fyri allar tínar tryggingar í mesta lagi vera 1/3 av móttikna eftirlønargjaldinum..

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Tryggingarupphædd** | 575.000 Kr. | 800.000 Kr. | 1.150.000 kr. | 1.700.000 kr. |
| **Gjald um mánaðin** | 143,75 kr. | 197,71 kr. | 281,75 kr. | 413,67 kr. |

## Útgjald

Tryggingarupphæddin verður goldin inn á tína skuld í Føroya Banka ella DLR. Er tryggingarupphæddin hægri enn skuldin, verður avlopið goldið beinleiðis til næsta avvarðandi. Um tú ynskir, at upphæddin við deyða skal ognast øðrum enn næsta avvarðandi, er møguligt at útfylla eitt oyðublað um broyting av tilskilan.
Tryggingarupphæddin verður útgoldin skattafrítt, tó skal arvaavgjald rindast. Neyvari treytir fyri útgjaldið eru at finna í tryggingartreytunum fyri Samlagstrygging.